## Tingseturnar ov stuttar

Í Grønlandi heldur leiðslan í flokkinum Atassut, at seturnar hjá Landstinginum eru í so stuttar, og flokkurin mælir nú til, at tær verða longdar, skrivar blaðið Sermitsiaq. Søren Alaufesen, sum er næstformaður í Atassut, sigur við blaðið, at grønlendska samfelagið stendur fyri so stórum avbjóðingum, at politikararnir mugu taka sær betri stundir til lóggávuarbeiðið. Sum stórmál nevnir hann kommunusamanleggingar og sjálvstýrislógina. Hann mælir tí Landstinginum til at leingja bæði vár- og heystsetuna.



## Mikkjal borgarstjóri

Nývalda kommunustýrið í Porkeris kommunu hevði fyrr í vikuni sín fyrsta fund. Á skránni fyri fundin vóru tvey mál: 1) Val av borgarstjóra og 2) Val av varaborgarstjóra. Á fundinum varð Mikkjal Sørensen (myndin) valdur til borgarstjóra, og Andreas Berg varð valdur til varaborgarstjóra, skrivar Suðuroyarportalurin. Mikkjal Sørensen er eitt kent andlit í føroyskum politikki. Umframt at hava sitið í kommunustýrinum í Porkeris kommunu í fleiri ár, hevur Mikkjal Sørensen eisini umboðað Javnaðarflokkin á Løgtingi, har hann eisini hevur sæti nú. Mikkjal Sørensen er 52 ára gamal.

–Samstundis hevur amerikanski umhvørvismyndugleikin eftirmett okkara granskingarúrslit í eini heili bók og grundað á okkara úrslit, hevur stovnurin gjørt av, at broyta markvirðið fyri, hvussu nógv dálkingarevni fólk kunnu fáa í seg.

– Ein avleiðing av okkara gransking er, at longu fyri 10 árum síðani fingu kraftverk, sum brúka kol, álagt at útvega sær betri royksáld á skorsteinarnar fyri at minka um útlátið av kyksilvuri.

– Hetta var ein útreiðsla upp á einki minni enn einar 60-70 milliardir krónur so tað fall sjálvandi ikki í góða jørð og tískil hava tey brúkt nógva orku upp á at tileinkisgera okkara gransking, men tað hevur ikki eydnast.

– Eg veit ikki um øll hesi fólkini hava mistikið seg og at tað bara eru nakrir føroyskir løgtingsmenn, sum hava fatað veruleikan, spyr Pál Weihe.



Hann leggur afturat at finst onkur stovnur, sum finnur feilur í okkara gransking, tekur hann fegin ímóti, tí hann hevur onga sum helst áhuga í koma við skeivum eginleikum.

Tað er eisini ført fram, at tað eru eisini evni í grind, sum hava góða ávirkan, eitt nú selen?

- Vit fáa nóg mikið av selen í aðrari føði og ómettaðar feittsýrur ber til at fáa úr fiski og aðrastaðni frá. Eg eri samdur í, at tað er samlaða inntakið av mati, vit skulu hugsa um. Men tá ið ein ávísur partur av føðini er so eitrandi er meiri vunnið við at taka tann partin burtur úr føðini, tí tað er nokk eftir av aðrari, heilsugóðari føði.

Eiga vit heilt at gevast at drepa grind?

– Hetta er eitt tilmæli og so stendur tað til fólk sjálvi, hvussu tey brúka tað. Taka føroyingar undir við tilmælinum, er ongin orsøk at drepa grind. Men vit eru ikki lóggevarar og tí fara vit ikki at siga politikarum, hvat teir skulu gera, tí tað er ikki okkara uppgáva

– Tilmælið er ikki givið til stuttleika men tí at vit meta, grundirnar eru haldgóðar.

Bilar tað nakað um vit fáa okkum ein bita av og á.

- Tað er nokk við grindini, sum við eini góðari sigar: Tað er ongin sum forgongur av at roykja eina sigar á nýggjárinum, sigur Pál Weihe

– Tað skal bara ikki vera nýggjár ov ofta, leggur hann afturat.

Δ

# Georg L. Petersen heim á Dimmu aftur

**Eftir trý ár í Kringvarpinum vendir Georg L. Petersen nú heim aftur á Dimmu. Hesaferð sum blaðmaður**

MIÐLAR
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Nógvir hyggjarar fara helst at sakna brúkarasendingina Rist, sum nú verður tikin av skránni hjá sjónvarpinum í Kringvarpinum.

Men verturin, Georg L. Petersen, sleppur helst allíkavæl at arbeiða víðari við brúkaramálum. Tí frá 1. januar verður hann aftur at finna millum blaðfólkini á Dimmalætting.

Hetta eru trý ár eftir, at hann fór av Dimmu yvir í Kringvarpið at arbeiða.

- Orsøkin er, at eg fekk eitt gott tilboð, sum eg tók av. Og Dimmalætting er eitt heilt annað blað í dag, enn tá eg fór á sinni. So eg síggi tað sum eina stóra og spennandi avbjóðing, við nýggjum tíðum og aðrari leiðslu, sigur Georg L. Petersen. Her sipar hann til nýggja bygnaðin við Árna Gregersen og Brynhild Thomsen í leiðsluni.

- Mær dámar stak væl journalistiska leistin á blaðnum, har tey eru meira kritiskt og spísk, sigur hann.

### Vanligur blaðmaður

Georg L. Petersen, sum er sonur ein av høvuðspartaeigarunum á Dimmalætting, Lisbeth L. Petersen, hevur áður verið blaðstjóri, ábyrgdarblaðstjóri og tíðindaleiðari á blaðnum. Men beint áðrenn hann gavst fyri trimum árum síðani, var hann blaðmaður. Kortini sigur hann seg ikki hava nakrar ætlanir um eitt leiðslustarv.

- Eg havi bæði verið tíðindaleiðari og stjóri. Men mær dámar væl at royna mína fakligheit sum journalistur Tað bæði tími og dugi eg best, sigur hann.

Eisini vísir hann á, at arbeiðsplássini á journalistiska økinum hanga ikki á trøunum, og hann kundi ikki hugsað sær at verði spinndoktari ella ráðgevi í vinnulívinum.

### Ikki løn, men sømdir

Um tilboðið frá Dimmu, sum Georg L. Petersen nú hevur tikið av, sigur hann tað ikki vera tann stóra lønarmunin í mun til í Kringvarpinum. Heldur eru tað aðrar sømdir, sum lokka.

- Millum annað sleppi eg í stóran mun sjálvur at gera av, hvørjar uppgávur eg átaki mær. Og tað er ikki óhugsandi, at eg haldi fram við brúkaratilfarinum, tí tað hevur avgjørt mín stóra áhuga, sigur Georg L. Petersen.



*Georg L. Petersen*

# Pál skal svara spískum spurningum um grind

**Hans Pauli Strøm vil nú hava Pál Weihe og Landslæknan í Løgtingið at forsvara tilmælið um at fáa føroyingar at halda uppat at eta grind**

GRINDATILMÆLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Landslæknin og Pál Weihe fáa nú eitt gylt høvi til at forsvara víðgongda tilmælið, teir komu við í síðstu viku um at føroyingar eiga at halda uppat at eta grind.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, fer nú at kanna eftir um tað ikki ber til fáa Pál Weihe og landslæknan á fund við løgtingslimirnar at svara spurningum um grindatilmælið.

Tað upplýsti hann í løgtinginum í morgun, eftir at Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, hevði spurt hann, hvat ætlanin er at gera við grindatilmælið.

Í løgtinginum í síðstu viku, vórðu teir báðir heglaðir niður, fyri at koma við tilmælinum um at vit skulu gevast at eta grind og tað vóru løgtingslimir, sum brúktu nógva orku upp á at sáa iva um granskingina.

Og tað varð endurtikið á løgtinginum í morgun eftir viðgerðini í Løgtinginum at døma, er ongin ivi um, at teir báðir læknarnir, Pál Weihe og landslæknin, fáa nógvar spískar spurningar frá løgtingsmonnum, men nú fáa teir so høvi til at forsvara seg.

Fleiri løgtingsmenn ivast snøgt sagt í, um granskingarúrslitið er rætt og í løgtinginum í farnu viku, varð eisini roynt at sáa iva um trúvirðið hjá granskarunum við at spyrja hvussu fíggjarliga heftir, teir vóru av teimum, sum hava fíggjað granskingina.

Tað vóru eisini teir løgtingsmenn sum tvíhalda um, at alheims gransking er ikki samd um, hvussu skaðilig grind er fyri heilsuna og at úrslitini eru mótstríðandi á hesum øki.

Annars segði Hans Pauli Strøm, at Heilsumálaráðið fer nú at seta seg í sambandi við fólkaheilsuráðið at viðgera, hvussu tað best ber til at kunna almenningin um tilmælið. Hann metir eisini, at málið eigur at verða tikið upp í landsstýrinum at viðgera, hvørji stig skulu takast fyri at kunna almenningin.

Hinvegin vóru tað eisini løgtingslimir sum halda, at vit eiga at taka málið upp, tí hetta kann skjótt verða eitt tvíeggjað svørð av tí, at uttanlands vita tey sjálvandi eisini um úrslitið og láta vit sum onki, kunnu vit vænta okkum ákoyringar fyri tað.

Hans Pauli Strøm sigur, at tá ið ivi verður sáddur um hesa granskingina, minnir tað hann mest um granskingina um heilsuvandan við tubbakki, tí har var stór orka løgd í at tileinkisgera tubbaksvandan, líka inntil tað ikki vendist aftur.

– Tað er ikki hóskandi at seta spurnartekin við gransking hjá okkara hægsta heilsufakliga myndugleika og tað er ongin orsøk til at seta spurnartekin við úrslitið.